# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um lungnakrabba

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um lungnakrabba

Við niðanfyri nevndu sjúkueyðkennum hjá persónum eldri enn 40 ár við viðkomandi tubbaksnýtslu er viðkomandi at senda ávísing til krabbaútgreining fyri illgruna um lungnakrabba

- Hosti í meira enn 4-6 vikur hjá einum lungnafrískum persóni
- Broytingar í hostimynstrinum hjá persóni við kroniskum bronkitti
- Nýtilkomin andaneyð við hartilhoyrandi óvanligari spirometri uttan aðra upplagda frágreiðing
- Hemoptysa (óansæð aldur og tubbaksnýtslu)
- Meira andaneyð enn vanligt hjá sjúklingi við KOL
- Ógreið pína í bróstkassanum
- Afturvendandi lungnabruni
- B-symptomir

Persónar, ið hava verið hásir í meira enn 3-4 vikur uttan onnur sjúkueyðkenni, skulu útgreinast fyri lungnakrabba. Men eiga fyrst at verða kannaðir av serlækna í ONH um illgruni er um larynxcancer

## Absolut indikatión fyri útgreining fyri lungnakrabba

Tað áliggur altíð at ávísa sjúklingin til krabbaútgreining, um minst ein av niðanfyri nevndu fortreytum er lokin

- Tá ein myndagreining (CT-/røntgen-kanning) vísir illgrunasama lungnaígerð ella ífyllu í mediastinum
- Um illkynjað biopsi bendir á uppruna í lungunum
- Sera greið sjúkueyðkenni, ið benda á lungnakrabba - hetta hóast nýggj røntgenkanning av bróstkassa, verður lýst sum normal.

## Handfaring av recidiv

- Í eftirlitstíðarskeiðinum: Vísa til uppfylgjandi deild
- Eftir eftirlitstíðarskeiðið: Vísa til viðkomandi kannandi deild til meting av tørvi á nýggjari kanning

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um lungnakrabba" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic.
Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026